# – Tómt í bygdini um vit missa posthúsið



*Posthúsið í Sandavági er opið nakrar tímar hvønn einasta dag. Tað verður nógv brúkt av bygdarfólkinum, og tey vóna tí at tað verður varðveitt í framtíðini*

*Mynd: Snorri Brenx*

**– Fólkið í Sandavági er sera væl nøgt við ta tænastuna, sum posthúsið veitir. Tað er ikki væntandi, at vit fáa so góða tænastu, um posthúsið verður afturlatið. Væntandi verður tað eisini dýrari at geva tænastu úr aðrari bygd, sigur bygdarráðið í Sandavági. Tey eru ikki einsamøll um hesa støðutakanina, tí tey allarflestu við valrætti í bygdini hava sagt tað sama**

TÆNASTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Sandavágur: Ein unga kvinna er við diskin og heintar ein pakka, sum hon hevur fingið sendandi. Hon er liðug við síni postørindi, og fer út gjøgnum dyrnar.

Tað ganga ikki meiri enn tríggir minuttir, nú er næsti kundi inni. Hesin hevur nakrar spurningar til avgreiðslumannin um, hvussu hann kann senda eitthvørt av landinum.

Hann er ikki meiri enn farin út úr posthúsinum, tá ein bilur steðgar uttanfyri. Ein maður kemur innar við hondin fullari við ymiskum pappírum, hann skal hava avgreitt.

Ein vanligur mikudagur á posthúsinum í Sandavági. Hetta staðið til at avgreiða síni postørindi eru fólk sera fegin um, men spurningurin er bara, hvussu leingi tað verður opið aftrat.

Sjálvt ynskir hvørt einasta sandavágsfólk at hetta posthúsið skal verða varðveitt. Men røddir hava verið og eru enn frammi um, at hetta posthúsið má lúta fyri fíggjarorkuni hjá stovninum.

Hetta veit fólkið, men tey ætla sær kortini ikki bara at standa hendur í lumma, meðan hetta fer fram. Tey valdu at engagera fólkið í einum mótmælisskrivi til myndugleikarnar ímóti hesi afturlating.

Í september mánaði 2004 kundu tí umboð fyri fólkið í Sandavági handa 340 undirskriftir til vinnumálaráðið har heitt varð so staðiliga á myndugleikarnar um at varðveita posthúsið í bygdini.

Í farna mánaði tóku bygdaráðið og ein áhugabólkur í Sandavági hetta málið uppaftur, nú broytingar skulu gerast í Postverkinum.

– Fyri ikki so langari tíð síðani lótu peningastovnarnir sínar deildir aftur her í bygdini. Og tí kunnu vit als ikki góðtaka, at posthúsið nú eisini verður afturlatið, verður sagt í hesum seinasta mótmælinum.

Hetta mótmælisskrivið varð eisini sent løgmansskrivstovuni, flokkunum í samgonguni og til løgtingsmenninar í Vágum.

### Stúra ella ikki stúra

At fólk í Sandavági nú – í veruleikanum á øðrum sinni! – hava sagt frá ynski sínum at varðveita posthúsið í bygdini kemur ikki av ongum.

Í skrivinum vísa tey á, at fyri meiri enn einum ári síðani varð ein lóg samtykt í tinginum um varðveitslu av posthúsum kring landið.

Millum hesi støðini var Sandavágur, og sagt varð eisini, at soleiðis kom at verða í nógv ár aftrat: Sandavágsfólk høvdu onga orsøk at stúra fyri posthúsinum í bygdini.

Men fyri stuttum bórust aftur tíðindi um eitt uppskot at broyta løgtingslógina, nú Postverkið sjálvt skal umskipast. Her verður m.a. skotið upp, at strika nakrar av teimum bygdunum har posthús framhaldandi skuldi verða. Millum hesar var Sandavágur.

Men hetta hvørki kunnu ella vilja sandavágsfólk góðtaka, og hava tí tikið stig til hesi bæði mótmælini. Tað seinna varð handað Bjarna Djurholm, vinnumálaráðharra fyri sløkum mánaði síðani.

### Eingin almenn tænasta

Í Sandavági er støðan hon, at bygdarfólkið hevur havt góðar umstøður at fáa ørindi sínum avgreidd í peningastovnunum.

Eitt skifti høvdu allir teir størru peningastovnarnir hvør sína deild í bygdini, men í dag er eingin peningastovnur. Allar deildirnar eru afturlætnar, og nú óttast fólk fyri at lokala posthúsið verður tað næsta – ella kanska tað seinasta.

Soleiðis sum fólkið skilir støðuna, er ætlanin, at tey í framtíðini ikki skulu hava nakað stað, har tey kunnu fáa eina almenna tænastu.

– Eldri og gomul fólk kunnu ikki fáa greitt síni ørindi her. Ikki so frægt sum tey kunnu fáa eitt glas av heilivági ella greitt síni pengamál, uttan at leiga sær bil av bygdini.

– Tað eru ikki øll sum eiga nútímans tøkni. Og tí er tað ófatiligt fyri okkum, at eitt so stórt afturstig skal henda í 2006, sigur fólkið.

### Dýr afturlating

Posthúsið í Sandavági heldur í dag til í hølum, har ein peningastovnur áður helt til.

Fólkið í bygdini eru sera væl nøgd við ta tænastu, sum posthúsið veitir teimum. Men tey óttast fyri, at henda tænastan verður ikki eins góð, um posthúsið verður afturlatið.

– Væntandi verður eisini dýrari at geva tænastu úr eini aðrari bygd, verður sagt.

### FAKTA

- Í 1918 lat upp brævstøð í Sandavági
- Í bygdini búgva nú 766 fólk. Bara í fjør vaks íbúgvaratalið við 28 fólkum
- 21 nýggj hús eru bygd ella verða bygd í næstum. Ein størri útstykking stendur fyri framman
- 13. september 2004 vórðu handaðar 340 undirskriftir sum mótmæli móti eini afturlating av posthúsinum í bygdini. At kalla hvørt mansbarn, sum hevði valrætt og sum var heima, skrivaði undir.
- 23. januar 2006 sendir Sandavágs kommuna og ein áhugabólkur enn eina áheitan til landsstýrismannin í vinnumálum um at varðveita posthúsið í bygdini.

## Einki forðar undirsjóvartunli til Sandoynna

**Landsverk:** Eingi jarðfrøðilig viðurskifti eru til hindurs fyri, at ein tunnil kann gerast millum Gomlurætt og Skopun.

Ein spurningur er kortini, hvørja ávirkan ein umfatandi umskaring kann fáa fyri ætlanina. Henda umskaringin kann vera knýtt at einum sterkum rivulagi við knústum gróti, sum kann liggja í Skopunarfirði. Hetta skulu tær neyvu jarðfrøðiligu og seismisku kanningarnar í ár verða við til at greina út.

Annars hevur vinnumálaráðharrin, Bjarmi Djurholm í vikuni upplýst, at hesin undirsjóvartunnilin er partur av eini størri samferðsluætlan, sum eisini fevnir um sambandið til Suðuroyar.

Samlaða prosjektið við tunlinum fer væntandi at taka umleið 8 ár og fer at kosta millum 600 og 800 mió. kr.

Í ár eru játtaðar 5. mió kr., ið verða nýttar til forkanningarnar. Fyribils metingar vísa at longdin av tunlinum verður 12 km og longdin á vegunum verða einar 500 metrar.

**sb.**



*Um nøkur ár verður kanska koyrandi undir Skopunarfjørð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Gamla vaskarí'ið sum mentanarhús

**Havn:** Hóast gamla vaskarí'ið í Tórsgøtu ikki hevur verið brúkt sum slíkt í mong ár, so hevur kortini verið ymiskt virksemi í húsinum, sum telist millum elstu bygningar í hesi gøtuni.

Sum skilst á býráðnum so eru størri ætlanir við hesum húsinum: Tað kann koma til at gerast eitt mentanarhús í miðbýnum í Havn.

Ætlanin er at gera hetta húsið í stand, og tá komið er út á summarið skuldu helst fyrstu sjónligu teknini sæst fyri hesum. Í fyrstu syftu skal fasadan gerast.

**sb.**

## Listaframsýning til frama fyri skúla

**Kristinlív:** Kristni felagsskapurin "Samverkamenn" fer í apríl mánaði at skipa fyri eini listaframsýning í Havn.

Á framsýningini vera málningar frá ymsum listamálarum, ið hava givið málningar til henda felagsskapin. Peningurin, ið inn kemur, fer til "Lærisveinaskúlan í Pakistan", ið er ein ætlan sum Samverkamenn stuðla.

Upplýst verður, at um okkurt listafólk ynskir at geva ein málning, ella onkur eigur ein málning og ynskir at geva hann til framsýningina, so eru tey vælkomin at seta seg í samband við felagsskapin.

Listaframsýningin verður í Smiðjuni í Lítluvík í døgunum 6. til 12. apríl – t.v.s. beint undan páskum.

**sb.**